# Vikuskifti

Nr. 60 • fríggjadagur • 24. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Monrad & Rislund í Norðurlandahúsinum



*Tað er ikki gott at vita, hvørjar leiklutir Monrad & Rislund fara at spæla í Norðurlandahúsinum*

SKEMT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tveir av mest elskaðu og mest hataðu donsku skemtarunum Monrad & Rislund koma til Føroyar í mei, og við sær hava teir sítt egna og sera danska skemtibland.

Kendu donsku skemtararnir Monrad & Rislund leggja 20. mei leiðina framvið Norðurlandahúsinum og við sær, hava teir nakrar av teimum yvir 160 ymisku persónunum, ið teir hava spælt seinastu fleiri enn 30 árini. Millum hesar eru Margretha drotning, Maria moy, Johan Sebastian Bach og Idi Ammin. Hetta er fjas á antin sera høgum ella sera lágum støði, alt eftir hvønn tú spyrt.

Monrad & Rislund góvu fyrstu plátuna Kød På Bordet / Sidde Ved En Å út í 1974. Við einum ótalið av skemtirundferðum, LP'um, fløgum, sjónbondum og DVD'um hava teir sett sín egna dám á danskt skemt líka síða. Hetta var langt áðrenn, at nakað æt Stand Up Comedy, og sjálvt eftir Stand Up Comedy innrásina, halda Monrad & Rislund fram í sama lag.

Á heimasíðu síni samanber Norðurlandahúsið Monrad & Rislund við føroysku Pipar & Salt. Henda samabering er ikki heilt burtur við, tí eins og Pipar & Salt hava Monrad & Rislund brent seg fastar í donsku tilvitskuna. Nógv av løgunum og skemtinum hjá Monrad & Rislund eru vorðin fólkaogn í Danmark. Hugtøk sum Akkasut munnvand og Jeg har lavet en pølse eru vorðin ein partur av danska málinum Men samstundis er skemtið eisini ov nógv av tí góða fyri summi, meðan onnur halda tað vera dekan ov fjasutt.



Petur Skeel Jacobsen um vikuskiftisveðrið:

## Summartíð – men onki summarveður

Í vikuskiftinum er tíðin aftur komin at flyta klokkuna ein tíma fram. Summartíð kallast tað, men veðrið í vikuskiftinum passar ikki til ta nýggju tíðina

VIKUSKIFTISVEÐUR
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

– Tað verður ófantaligt veður í vikuskiftinum, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur. Regn, vátakavi og hvassur vindur.

Leygardagurin verður hampuligari enn sunnudagurin. Tá er góður møguleiki fyri at mesti partur av degnum verður turrur.

Kavin fer at minka niður í næstan onki, bara í fjøllunum verður hann liggjandi.

– Tey, sum koyra í hæddini, kunnu rokna við eitt sindur av krapa, sigur Petur.

Hitin verður eini 5-6 hitastig um dagin og niður móti frostmarkinum um náttina.

Fyrra helvt av næstu viku verður heldur lýggjari.

